UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. des. 2021
J. nr.: 21/24090

Svar

upp á

§52a fyrispurning frá Henrik Old, løgtingsmanni, viðvíkjandi príshækkingum í SEV

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at tvinga húsarhaldini at gjalda fyri streym, sum tey ikki fáa nyttu av?
2. Ætlar landsstýrið at veita endurgjald til SEV fyri streym, sum húsarhaldini ikki fáa nyttu av og samtíðis fyri at sleppa undan príshækkingum?

Svar til spurning 1 og 2

Umhvørvisstovan hevur veitt loyvi til tríggjar nýggjar vindmyllulundir seinastu tvey árini. Hetta sum ein liður í at fyrireika samfelagið til orkuskiftið frá termiskari orku til grøna elorku.

Av nevndu loyvum vórðu tvey loyvi veitt samstundis á heysti í 2019 í Flatnahaga og á Eiði. Triðja loyvið varð veitt í apríl 2021 við Gellingarklett.

Eftir upprunaligu ætlanini skuldu vindmyllulundirnar á Eiði og í Flatnahaga standa uppi í 2020/2021 og Vindmyllulundin við Gellingarklett í 2021/2022.

Soleiðis sum útlitini nú eru, kann væntast, at:

- Vindmyllulundirnar í Flatnahaga og á Gellingarkletti koma upp á heysti í 2022.
- Vindmyllulundin á Eiði kemur upp á heysti í 2023, treytað av, at neyðugu loyvini kunnu útvegast til nýggju staðsetingina.

Sambært meting frá SEV er møguligt at fáa til høldar uml. 44% av samlaðu elframleiðsluni frá teimum trimum vindmyllulundunum undir einum. Eftir at ein pumpuskipan er sett í verk, væntar SEV, at møguleiki verður fyri at taka í móti einum munandi størri parti av elframleiðsluni frá nevndu vindmyllulundum.

Metingar frá SEV um møguliga framleiðslu áðrenn ein pumpuskipan er sett í verk:

GWh	Eiði	Flatnahagi	Gellingarklettur	Ílalt
Møguliga framleiðsla	57	62	87	206
Vindorka til høldar	46	27	18	91
Vindorka til spillis	11	35	69	115

Kostnaðurin fyri elframleiðslu úr vindorku fyri tey trý nevndu loyvini liggur um 23 oyru/kWt. Kostnaðurin fyri oljugrundaða elframleiðslu liggur um 70 - 80 oyru/kWt (bundið at, hvat oljuprísurin til eina og hvørja tíð er).

Við støði í nevndu tølum frá SEV um, at 44% av vindorkuni samlað frá øllum trimum vindmyllulundunum kann koma til høldar, so vísir roknistykkið, at miðalkostnaðurin fyri vindorkuna fer at liggja á 52 oyrum/kWt, inntil gjørligt verður at fáa meira av elorkuni til høldar umvegis eina pumpuskipan, og so hvørt sum eftirspurningurin eftir elorku veksur. Sostatt er kostnaðurin fyri elframleiðsluna frá nevndu vindmyllulundum væl lægri enn kostnaðurin fyri oljugrundaða elframleiðslu.

Tað, at vindmyllulundin á Eiði í fyrsta lagi kann koma í rakstur á heysti 2023, viðførir, at ein lutfalsliga størri partur av vindorkuni frá Gellingarkletti og Flatnahaga kemur til høldar. Í løtuni arbeiðir SEV við at fáa neyðug loyvi til nýggju staðsetingina til vindmyllulundina á Eiði.

Fyri at kunna stabilisera vindorkuna, verður neyðugt at gera íløgur í battarískipanir o.a. Hetta er kostnaður, sum SEV-net skal bera. Um hesin kostnaður verður lagdur afturat kostnaðinum fyri vindmyllulundirnar, so er nevndi framleiðslukostnaður í miðal framvegis niðanfyri kostnaðin fyri oljugrundaða elframleiðslu.

Samanumtikið metir Umhvørvisstovan, at ætlanirnar við teimum trimum vindmyllulundunum í Flatnahaga, við Gellingarklett og á Eiði, eru neyðug stig á grønu kósini. Hvat kostnaði viðvíkur so verður eisini mett, at hesar vindmyllulundirnar fara at geva eitt positivt íkast til búskapin hjá SEV longu frá byrjan. Hetta hóast ein partur av elorkuni ikki kann koma til høldar í einum skiftistíðarskeiði, fram til ein pumpuskipan væntast at verða sett í verk.

Í mun til framrokningar av elorkutørvinum komandi árini og vísandi til ætlanina um at gera Føroyar grønar á landi seinast í 2030, so er ongin ivi um, at vit eru afturút við útbygging av vindorkumátti, sum í rakstri er sera bíligur í mun til elframleiðslu úr olju.

Fyri hvørt ár, sum útbyggingin av vindorkumáttinum letur bíða eftir sær, rindar elbrúkarin samlað sæð stórar eykarokningar fyri dýra og dálkandi elframleiðslu úr olju.

Tað er lógarásett, at SEV skal hava hóskandi inntøkur til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Týdningarmikið er at gera greitt, at hóast elframleiðsla úr vindorku er bíligari enn elframleiðsla úr olju, so snýr útbygging av vindorkumáttinum seg ikki bert um búskap. Vit skulu útbyggja grønu orkukeldurnar m.a. við atliti til at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi. Sambært elveitingarlógini er eitt av høvuðsendamálunum, at elorkuframleiðsla úr varandi orkukeldum verður økt, og at prísurin fyri ravmagn skal ikki vera hægri enn neyðugt.

Landsstýrismaðurin hevur ikki tørv á at tvinga húsarhaldini at gjalda fyri streym, og/ella veita endurgjald til SEV fyri streym, sum húsarhaldini ikki fáa nyttu av.

Men um vit ikki skjótt koma longri fram á leið við útbyggingum av vindorkumáttinum, so fara elbrúkararnir framhaldandi at rinda fyri dýra og dálkandi elframleiðslu úr olju, heldur enn at rinda fyri lutfalsliga bíliga grøna elframleiðslu úr vindorku.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 4. desember 2021

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður